**Almanna- og Heilsumálaráðið**
*Starvsfólkadeildin*

# Leiðari til nýggjan dagstovn til fjølbrekað børn

Í samband við, at Almanna- og heilsumálaráðið hevur gjørt av, at seta á stovn ein dagstovn fyri fjølbrekað børn í Eysturoynni, verður søkt eftir einum leiðara at byrja í januar 2005.

Dagstovnurin er tó treytaður av, at løgtingið samtykkir játtanina til dagstovnin.

Dagstovnurin, sum kemur at halda til á Saltnesi, verður skipaður sum ein serstovnur fyri fjølbrekað børn, har talan verður um samskipan av ansing, viðgerð, umlætting og menning av fjølbrekaðum børnum. Dagstovnurin verður tann fyrstu av sínum slagi í Føroyum.

Dagstovnurin er normeraður til 8 fjølbrekað børn í aldrinum 0 til 18 ár. Hesi børn hava eisini møguleika fyri, at koma til umlætting á stovninum um kvøldið og/ella um náttina.

Dagstovnurin er undir uppbyggjan, og kemur leiðarin at standa fyri hesi uppgávu.

**Uppgávur:**
- at leiða dagstovnin,
- at samskipa arbeiðið hjá starvsfólkunum, sum vera um børnini,
- at stimbra og menna børnini
- at avgera, saman við eini upptøkunevnd, hvørji børn verða upptikin á dagstovnin

Harumframt hevur leiðarin fakligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av stovninum.

**Førleikakrøv:**
- søkt verður eftir einum persóni við fakligari útbúgving so sum pedagogur, fysioterapeutur ella ergoterapeutur, við umsitingarligum og fakligum royndum,
- hevur góð samstarvsevni
- virkisfúsur, og opin fyri broytingum.

Leiðarin hevur ábyrgdina fyri dagstovninum mótvegis Almanna- og heilsumálaráðnum í eitt tíðarskeið. Síðan er ætlanin, at dagstovnurin umsitingarliga skal liggja undir Almannastovuni. Hetta verður væntandi um eitt ár.

**Lønar- og setanartreytir:**
Løn- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Almanna- og heilsumálaráðið, Súsanna Nolsøe tlf. 304036.

**Umsóknarfreist:**
Umsóknin skal sendast til Almanna- og heilsumálaráðið, Eirargarður 2, 100 Tórshavn. Umsóknin skal verða Almanna- og heilsumálaráðnum í hendi innan 17. desember 2004, kl. 12.00.

**HÚS Í VESTMANNA TIL SØLU**



- Húsini standa sera væl fyri við avbera góðum útsýni
- Til húsini hoyra hjallur og bilhús
- Grundøkið er 622 m²
- Húsini eru 16x20 alin
- Bilhúsið er 28 m²
- Verða seld um hóskandi boð fæst

**TEL 42 43 80**

**Nýggjur Timburhandil í kollafirði**

Í samand við at vit lata upp nýggjan Timburhandil & Byggibúð á Langasandi bjóða vit til móttøku

**mánadagin 6. desembur 2004 frá kl. 14.00 til 18.00**

**Fjarðahús**
*Timburhandil & Byggibúð*

*- tú velur væl!*

Pf. Fjarðahús Timburhandil & byggibúð - Langasandur - Kollafjørður
Tel 472000 - Faks 472001- fjardahus@fjardahus.fo - www.fjardahus.fo

**P/F Wenzel og Mazda Danmark gjørt samstarvsavtalu**

Frá 1. desember 2004 verður P/F Wenzel sum umboðar bilmerkið Ford, eisini autoriserað, til at umboða Mazda Service.

Allir Mazda bilar sum koyra í Føroyum, hava nú eisini møguleika at brúka P/F Wenzel sum sítt verkstað. Tað verið seg mekaniska verkstaði, plátuverkstaði ella keyp av eykalutum. Alt garanti, plátu- og servicearbeiði verður gjørt.

P/F Wenzel hevur gott starvsfólk við drúgvum royndum. Í oktobur mánaða vóru umboð frá Wenzel á skeið hjá Mazda Danmark og fingu sær holla vitan um Mazda bilarnar. Mekaniski- og plátu verkstaðurin hjá P/F Wenzel eru sera væl útstýrdir við øllum teimum nýmótans tólum, sum eru neyðug í dag. Um tænastan skal verða í hásæti, er hetta sjálvsagt eitt krav.

**Í hesum sambandi verður opið hús leygardagin 4. desember 2004, frá kl. 10.00 til 16.00**

Allir Mazda kundar fáa í hesum sambandi møguleika at vitja verkstaðið, har møguleiki er at fáa eina "Service 2000" kanning, tað vil siga, bilurin verður kannaður mekanisk, síðani kann eitt tilboð gerast uppá møguligar umvælingar. Harafturat kann olja- og filtur skiftast.

Service 2000 og olju/filturskift kostar einans kr. 399,-.
Tilboðið er galdandi allan desember mánað.

Bilasølan hevur eisini eitt kanón tilboð. Í samband við at Focus kemur í nýggjum sniði fyrst í komandi ári, eru 10 Focus bilar á restgoymslu í Føroyum. Hesir bilarnir verða seldir við ókeypis olju- og filturskifti í 2 ár + kavadekk á felgum v/levering. Harafturat eru nógvir góðir brúktir bilar til sølu. Brúktbilar sum kostað kr. 85.000,- ella meira, fáa 6 mánaðar brúktbilagaranti.

Okkurt gott og leskandi verður bæði til børn og vaksin.

Verið hjartaliga vælkomin á vitjan.
Akranesgøta 5
WWW.WENZEL.FO

mazda SERVICE

Ford SERVICE